Álit

í

løgtingsmáli nr. 75/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl. (Markið fyri inntøku, ið verður skattað eftir kapitalvinningsskattalógini, verður hækkað o.a.)

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, hevur lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 18. mars 2024 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 11. og 18. apríl 2024.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Landsfelag Pensjónista og landsstýriskvinnuna í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Nevndin metir ikki, at tað er rætt, at pensjónistar, ið hava rentuinntøku, ið er omanfyri kr. 2.000 árliga, verða revsaði og harvið missa viðbótina til ávísar pensjónistar. Viðbótin er í 2024 kr. 8.160.

Tey, sum hava verið rakt av hesi ásetingini seinastu árini, eru í fleiri førum fólk ,sum hava átt nøkur fá partabrøv, sum hava givið eitt vinningsbýti, sum er størri enn markið uppá kr. 2.000.

Viðbót til ávísar pensjónistar hevur eisini sum treyt eitt annað inntøkumark. Um inntøkan hjá einum støkum pensjónisti fer upp um kr. 60.000 og kr. 80.000 hjá hjúnum, so fellur viðbótin burtur. Inntøka í hesum marki er ein samanteljing av lønarinntøku, eftirlønarútgjaldi og kapitalvinningi.

Nevndin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Frágreiðandi heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

   “(Markið fyri inntøku, ið verður skattað eftir kapitalvinningsskattalógini, verður strikað)”

2. § 1, nr. 2 verður orðað soleiðis:
   “§ 3, stk. 2 verður strikað.”

3. § 1, nr. 3 verður strikað.

Viðmerkingar:
Við broytingini verður viðbót til ávísar pensjónistar ikki ávirkað av, at virðið av nettoinntøku, ið verður skattað eftir reglunum í kapitalvinningsskattalógini, er omanfyri kr. 2.000 árliga.

Kapitalvinningur verður sostatt einans roknaður við í samlaða inntøkumarkið fyri at fáa rætt til viðbót til ávísar pensjónistar.

Broytingaruppskotið javnsetur allar inntøkur, so viðbót til ávísar pensjónistar einans fellur burtur, um allar inntøkur samanlagt fara upp um markið, sum fyri støk er kr. 60.000 og fyri hjún kr. 80.000.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur nevndin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 7. mai 2024

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstforkvinna	Kaj Leo Holm Johannesen
Johan Dahl	Árni Skaale	Hans Jacob Thomsen
	Súsanna Bertholdsen	